GÓÐ TÍÐINDI

Tykkum er í dag Frelsari føddur,
sum er Kristus, Harrin, í staði Dávids.
Lukas 2,11

NR. 5 / DESEMBER 2024 / ÁRGANGUR 33

# Funnu vísmenninir Jesus í Betlehem?



John í Skemmuni

**Hvaðani komu vísmenninir, sum vit verða mint á um jólini, og hvar funnu teir Jesusbarnið? Vit síggja ofta myndir av vísmonnunum við krubbu Jesusar í Betlehem, har teir ofra Honum gávur og tilbiðja Hann. – Men var tað har í fjósinum, at teir funnu Jesus?**

Hjá Matteusi lesa vit um hendingina, tá ið vísmenninir komu til Ísraelsland at tilbiðja Kongin, ið føddur var (Matt. 2,1-3): *„Táið nú Jesus var føddur í Betlehem í Judea – á døgum Heródesar kongs – komu vísmenn úr Eysturlondum til Jerúsalem og søgdu: „Hvar er kongur Jødanna, sum føddur er? Tí vit hava sæð stjørnu Hansara har eysturi og eru komnir at tilbiðja Hann.“ Táið Heródes kongur hoyrdi hetta, kom ótti á hann og á alt Jerúsalem við honum.“*

## Úr Bábel?

Ikki ber til at vera avgjørdur um, hvaðani vísmenninir komu. Men tó er væl hugsandi, at teir komu úr Bábel, núverandi Irak. Í Bábel vóru nógvir vísmenn, ið vóru ráðgevarar hjá kongunum har (Dán. kap. 2).

Stór mongd av jødum vóru herleiddir til Bábel nakrar øldir frammanundan, og millum teirra var profeturin Dániel, sum gjørdist ein av fremstu ráðgevarum hjá fleiri av kongunum í Bábel. Dániel var so dugnaligur og álítandi, at kongurin Nebukadnezar setti hann til *„hægsta fyristøðumann alra vísmanna í Bábel“* (Dán. 2,48).

Vísmenninir, sum vit lesa um hjá Matteusi, hava óivað havt kunnleika til Dániel og hava tí kent og granskað skriftir jødanna.

## Eitt størri ferðalag

Vanliga hoyra vit um tríggjar vísmenn, ið mangan verða nevndir Baltasar, Kaspar og Melkior. At teir skuldu vera tríggir, kemur helst av, at teir ofraðu barninum gull, roykilsi og myrra (Matt. 2,11). Men vit lesa ongastaðni í Bíbliuni, hvussu teir itu, ella hvussu nógvir teir vóru.

Vísmenninir hava óivað verið múgvandi menn og partur av einum størri fylgi við hermonnum sum verju, tí vandamikið var at ferðast tá á døgum. Og tað hevur tikið rúma tíð at fyrireika hesa drúgvu ferð, tí at leiðin til Jerúsalem var long.

## Stjørna Hansara

Vísmenninir, sum eisini vóru stjørnugranskarar, komu, tí teir høvdu *sæð stjørnuna hjá kongi jødanna har eysturi og vóru komnir at tilbiðja Hann* (Matt. 2,2). Hildið verður, at stjørnan var ein stjørnumynd – ein serstøk stjørnustøða – sum segði frá føðing Jesusar.

Vit lesa hjá Matteusi 2,9, at tá ið teir fóru avstað frá Heródesi, gekk stjørnan, sum teir høvdu sæð har eysturi, *„fyri teimum, inntil hon kom og varð standandi, uppi yvir har barnið var.“*

Hetta tykist benda á, at stjørnan var ein guddómlig opinbering, tí ein vanlig stjørna ber seg ikki at, sum henda stjørnan gjørdi.

## Røringur í Jerúsalem

Vísmenninir og stóra fylgið við hermonnum, sum komu til Jerúsalem, fóru sjálvsagt til kongaborgina at finna nýfødda kongasonin. Tá ið Heródes hoyrir um Kongin, ið føddur er, fellur ótti á hann, tí nú tykist kongadømi hansara at vera í vanda.

Ótti fellur eisini á alt Jerúsalem av hesi stórfingnu vitjan. Óttin kom óivað eisini av, at Heródes var ein óútrokniligur kongur, sum kundi finna upp á tað óhugnaligasta, um hann fekk illgruna um, at vald hansara var hótt.

Heródes kallaði allar høvuðsprestar og teir skriftlærdu saman at fáa at vita, hvar Kristus skuldi verða føddur. Teir svaraðu honum, at sambært profetinum skuldi Hann verða føddur í Betlehem í Judea (Matt. 2,4-5).

## Hvussu gamal var Jesus?

Vit kunnu meta um, hvussu gamal Jesus var, tá ið vísmenninir komu til Jerúsalem, út frá tí, sum vit lesa um Heródes (Matt. 2,7): *„Tá*



*kallaði Heródes loyniliga vísmenninar til sín og fekk frá teimum gjølla at vita um tíðina, táið stjørnan hevði verið at sæð.“*

Hví vildi Heródes hava tað at vita? Tí vísmenninir vóru sannførdir um, at tá ið teir fyrstu ferð sóu stjørnuna, varð Jesus føddur. Hetta hevur helst verið okkurt um eitt ár frammanundan, og tí er Jesus umleið eitt ára gamal. Hetta skilst av tí, sum Heródes seinni gjørdi, tá ið vísmenninir ikki komu aftur við boðum um, hvar Jesus var. Vit lesa (Matt. 2,16): *Táið Heródes nú sá, at hann var svikin av vísmonnunum, varð hann ógvuliga illur og sendi menn avstað og læt drepa øll dreingjabørn í Betlehem og allastaðni har um vegir, sum vóru tvey ár og minni, eftir tíðini, ið vísmenninir høvdu sagt honum.“*

Heródes vildi vera vísur í, at Jesus var ímillum tey dripnu dreingjabørnini. Tí drap hann øll, ið vóru tvey ár og minni. Um Jesus hevði verið nýføðingur, hevði hann neyvan dripið tvey ára gomul.

## Jesus og Maria í einum húsi

Heródes sendi vísmenninar til Betlehem, eftir at hann hevði álagt teimum at siga sær frá, tá ið teir høvdu funnið barnið, so hann eisini kundi koma og tilbiðja tað.

Tá ið vísmenninir – ókunnigir við óhugnaligu ætlan Heródesar – fóru avstað frá Heródesi, gekk stjørnan, sum teir høvdu sæð har eysturi, *„fyri teimum, inntil hon kom og varð standandi, uppi yvir har barnið var.“* (Matt. 2,9).

Men hvagar leiddi stjørnan teir? Tað lesa vit ongastaðni. Men greitt er, í hvussu er, at tað var ikki til eitt fjós, tí vit lesa (Matt. 2,11): *„Teir fóru so inn í **húsið** og sóu barnið og móður tess, Mariu …“*

## Familjan aftur í Nazaret

Nær fóru Maria og Jósef aftur til Nazaret við Jesusi? Í Lukasi 2,21 lesa vit, at átta dagar eftir, at Jesus var føddur, varð Hann umskorin. Síðan fáa vit at vita (Luk. 2,22): *„Táið reinsanardagar teirra eftir Móselóg vóru at enda, fóru tey niðan til Jerúsalem við Honum at bera Hann fram fyri Harran.“*

Sambært Triðju Mósebók 12. kapitli vóru reinsanardagarnir 33 í tali, so nú eru 41 dagar gingnir, síðan føðing Jesusar.

Betlehem var rættiliga nær við Jerúsalem, so ferðin hagar hevur ikki verið drúgv. Og møguliga hava tey steðgað har í eina viku.

Síðan lesa vit í Lukasi 2,39: *„Táið tey nú høvdu fullført alt eftir lóg Harrans, fóru tey aftur til Galilea, til bý sín, Nazaret.“*

Sostatt er niðurstøðan, at góðar tveir mánaðir eftir føðing Jesusar eru tey óivað aftur í Nazaret.

## Hvar funnu vísmenninir Jesus?

Hvar var Jesus, tá ið vísmenninir komu til Jerúsalem? Heródes sendi – sum nevnt – vísmenninar til Betlehem, men vit lesa ikki, at teir komu hagar, tí stjørnan leiddi teir til húsið, har Jesus var.

Um vísmenninir komu til Ísraels umleið eitt ár eftir føðing Jesusar, so hava Jesus og Maria sambært Lukasi verið í Nazaret í eina rúma tíð. Tí er væl hugsandi, at stjørnan leiddi vísmenninar til Nazaret.

Ein annar møguleiki er, at vísmenninir komu til Jerúsalem um páskirnar, og at Jesus, Maria og Jósef vóru har nærhendis teir dagarnar, tí vit lesa í Lukasi 2,41: *„Foreldur Hansara fóru hvørt ár til Jerúsalem um páskahøgtíðina.“*

Ivasamt er kortini, um Maria – meðan Jesus enn var so lítil – aftur fór eina so langa ferð; og áðurnevnda vers tykist hava tilknýti til tíðina, tá ið Jesus var vorðin eldri (Luk. 2,41-52).

> **„Tí Barn er føtt okkum, Sonur er givin okkum, og á øksl Hansara skal harraveldið hvíla; Hann eitur Undurfullur, Ráðgevari, Veldigur Gud, Ævigur Faðir, Friðarhøvdingi.“**

## Barnið verður tilbiðið

Vísmenninir fóru so inn í húsið (Matt. 2,11) og *„fullu niður og tilbóðu“* barnið. Teir hava óivað havt kunnleika til skriftir Ísraels ígjøgnum Dániel, sum var kendur í Bábel.

Mundu teir kenna tað, sum síggjarin Bileam profeteraði umleið 1500 ár f.Kr. (4. Mós. 24,17): *„Eg síggi Hann, men ikki nú, eg skoði Hann, men ikki nær – upp rennur stjørna av Jákupi, veldissproti rísur av Ísrael …“* Ella brotið hjá Esaiasi frá umleið 700 f.Kr. (Es. 9,6): *„Tí Barn er føtt okkum, Sonur er givin okkum, og á øksl Hansara skal harraveldið hvíla; Hann eitur Undurfullur, Ráðgevari, Veldigur Gud, Ævigur Faðir, Friðarhøvdingi.“*

Teir hava óivað eisini kent skriftir Dániels frá umleið 550 f.Kr., har vit lesa um, at *ein Salvaður kemur, ein Høvdingi, sum skal verða fyribeindur og einki hava* (Dán. 9,25-26).

Vísmenninir vóru greiðir yvir, at hesin, ið føddur var, var guddómligur og átti at verða tilbiðin.

## Ofra barninum gávur

Síðan stendur, at teir (Matt. 2,11): *„… lótu upp goymslur sínar og ofraðu tí gávur: Gull, roykilsi og myrra.“* Hesar gávur høvdu tvífaldan týdning: Fyri tað fyrsta søgdu tær nakað um persónin Jesus og lív Hansara. Gull er tekin um guddómleika og kongligu dýrd Jesusar. Roykilsi er luktilsi, sum peikar á reina og syndafría lív Jesusar. Myrra er beisk urt, sum vísir á líðing og deyða Jesusar.

**GÓÐ TÍÐINDI** NR. 5

Útgevari: Góð Tíðindi
Konto í Betri: 9181 5604941
Ábyrgd: John í Skemmuni
Umbrot: Anna & annað – Anna Simonsen
Prent: Føroyaprent
Blaðið verður sent øllum húskjum ókeypis og kann lesast á evr.fo

*Hjartans tøkk fyri forbøn og stuðul.*

Fyri tað næsta fingu hesar virðismiklu gávur stóran týdning fyri familjuna, nú hon fekk boð um at flýggja til eitt annað land undan óndu ætlanum Heródesar.

## Gud ávarar í dreymi

Vísmenninir, sum ikki vistu, hvat Heródes hevði ætlanir um, vóru nú av Gudi ávaraðir í dreymi um ikki at fara aftur til Jerúsalem. Vit lesa (Matt 2,12), at teir fóru *„aðra leið heimaftur til land sítt“.*

Eisini vísti eingil seg fyri Jósefi í dreymi og bað hann flýggja við familjuni til Egyptalands. Hetta gjørdi Jósef um náttina, helst fyri at eingin skuldi fáa at vita, hvar tey vóru farin, so at tey kundu kenna seg trygg.

## Illgerðir Heródesar

Tá ið Heródes varnaðist, at vísmenninir ikki komu aftur at siga honum, hvar Jesus var, læt hann øll dreingjabørn í Betlehem, ið vóru tvey ár og yngri, drepa.

Tá gekk profetorð Jeremiasar út, sum var skrivað umleið 600 ár frammanundan (Matt. 2,18): *„Rødd hoyrdist í Rama, eymkan og grátur og stór sorg; Rakul græt um børn síni og vildi ikki lata seg ugga; tí tey eru ikki longur.“*

Tá ið Heródes var deyður, vísti eingil seg í dreymi fyri Jósefi og bað hann fara aftur til Ísraelsland við familjuni, tí nú vóru teir deyðir, ið lógu Jesusi eftir lívinum. Og Jósef fór við barninum og móður tess aftur til Ísraelsland.

## Kongasonurin í fátæksligum húsi

Vísmenninir úr Eysturlondum hava óivað ferðast heimaftur við stórari gleði eftir hesa serstøku ferð, har Gud á undurfullan hátt hevði leitt teir til stóra Kongasonin, ið føddur var. Men munnu teir ikki eisini hava undrast á, at teir ikki funnu Hann í eini glæsiligari kongaborg, men í einum fátæksligum húsi?

Hetta minnir okkum á stóra undrið, at Gud av kærleika til okkara sendi Son Sín niður á hesa neyðars jørð fyri at taka búgv hjá øllum, bæði høgum og lágum, ið vilja boyggja seg fyri Honum og tilbiðja Hann.



# Vitnisburður: Frida Bech

Frida er født og uppvaksin í Hirtshals. Mamman var hálendsk og pápin dani. Systkinaflokkurin var stórur, 14 í tali – 6 dreingir og 8 gentur. Frida hevði ein góðan barndóm. Foreldrini vildu, at hon og systkini komu í sunnudagsskúla hjá indremissiónini og baptistunum har í Hirtshals.

Frida var røsk og ágrýtin og ansaði børnum hjá fleiri familjum eftir skúlatíð. Hetta fekk hon eina lítla samsýning fyri.

Einaferð var hon úti fyri álvarsligari ferðsluvanlukku. Hon ansaði børnunum hjá eini familju og fór eini ørindi í bili saman við einum vini hjá familjuni. Maðurin koyrdi útav – helst við ov nógvari ferð – og rýmdi frá vanlukkustaðnum. Frida fekk stóran skaða og varð liggjandi í bilinum við ongum viti. Fólk komu á staðið, og Frida varð løgd inn á sjúkrahús og lá har uttan vit í 3 dagar. Hon lá á sjúkrahúsinum rættiliga leingi, til hon kom seg aftur.

14 ára gomul gavst Frida í skúlanum og fór út at arbeiða. Hon arbeiddi á matstovu og fiskavirki bæði í Hirtshals og í Frederikshavn.

Frida hitti føroyska mann sín, Gunnar, í Hirtshals, haðani hann sigldi. Í 1971 fór Gunnar at sigla í Íslandi, og Frida flutti hagar saman við honum. Tey vóru í Íslandi eitt slakt ár. Frida kom at búgva hjá føroyskari konu, sum var gift í Íslandi, og ansaði barni hennara.

Frida og Gunnar fluttu aftur til Danmarkar, og í 1973 fluttu tey til Føroya og búsettust í Lopra, haðani Gunnar er ættaður.

Frida fór beinanvegin út arbeiða. Hon arbeiddi á Suðurfisk og Polarfrost í Vági og seinni á skrivstovuni og á roykivirkinum hjá Hera Hjelm.

Frida og Gunnar giftust í 1976 og búðu hjá verforeldrunum í Lopra fyrstu tíðina. Síðan fóru tey at byggja, og í 1981 fluttu tey inn í nýggj hús í Lopra.

Frida og Gunnar eiga børnini Annie, Susi og Kristinu. Ommu- og abbabørnini eru 10 í tali. Í 1983 upplivdu hjúnini ta stóru sorg at missa tvíburðar, ið vóru ov tíðliga føddir.

## Frida greiðir frá umvending síni:

Tá ið vit fluttu til Lopra, búðu vit fyrstu tíðina hjá verforeldrunum. Har vóru onkuntíð húsmøtir. Teir, sum høvdu møtini, vóru David Bech og Johannes Nilssen. Leif Nilssen hevði eisini møtir har.

Á einum húsmøti spurdi Johannes Nilssen meg, um eg var frelst. Eg svaraði „nei“. Síðan spurdi hann, um eg vildi verða frelst, og tað játtaði eg. Hann bað saman við mær, og tað var eg glað fyri. Tá bleiv eg vakt andaliga og kom síðan at ganga á møti ymsastaðni saman við svigarinnuni, Amy. Vit gingu á møti hjá heimamissiónini, í hvítusunnusamkomuni og hjá brøðrunum.

Í 1976 høvdu Svenning av Lofti og aðrir møtir í Vági og í Porkeri. Á einum av møtunum í Vági kendi eg á mær, hvussu Harrin kallaði á meg, men eg segði „bíða“. Møtini hildu fram í Porkeri. Og á tí eina møtinum – tann 15. februar – gav eg meg yvir til Harran og tók ímóti Honum sum Frelsara mínum. Hetta hendi á tann hátt, at eg reisti meg upp á møtinum og takkaði Jesusi fyri, at Hann doyði fyri syndir mínar á Golgata.

Eg tók so avgerð um at lata meg doypa. Dópurin fór fram í Bethel í Vági, sunnukvøldið 20. februar. Fleiri onnur blivu eisini doypt hetta kvøldið.

Henda tíðin og avgerðin, ið eg tók, kom at hava avgerandi týdning fyri meg. Eg upplivdi eina gleði og ein frið, sum eg ikki hevði kent áður.

Húsmøtir vóru síðan regluliga í ymsum heimum í Lopra. Seinni, tá ið Terji og Tordis Nilssen fluttu til Lopra, vórðu regluligu møtini hildin hjá teimum.

Leif Nilssen hevði ómetaligt hjarta fyri mær og okkum. Hann var ein sannur hirði. Hann áminti okkum og hevði okkum við sær á møti aðrastaðni í oynni.

Tá ið Sumbiartunnilin var liðugur í 1997, vórðu møtini sunnudag flutt í salin Betania í Sumba. Hagar komi eg regluliga til at minnast Harran. Annars komi eg ofta á møti í Bethel í Vági og aðrastaðni í oynni, tá ið serstøk møtir eru. Eg elski at hoyra Guds orð og at hava samfelag við onnur trúgvandi.

Eg vitji gomul og einslig og lesi og biði við teimum. Familjan í Danmark liggur mær nógv á hjarta, og eg havi vitnað fyri teimum um, hvussu gott og neyðugt tað er at kenna Jesus og at fylgjast við Honum.

Tá ið mamma mín lá til tað síðsta, spurdi eg Leif Nilssen, um hann kundi biðja Levi Joensen, sum virkaði á Malta í Hirtshals, vitja hana. Gjøgnum hesar vitjanir kom hon til trúgv á Harran, og eftir hennara ynski sat Levi hjá henni, tá ið hon andaðist.

* * *

Sum eg eldist, má eg sanna, hvussu gott tað er at kenna Harran. Tað er so signað at kunna leggja øll, sum eg elski, børn, ommubørn og alla familjuna í hendur Harrans.

Tað var gott, at eg sum ung kvinna kom til trúgv á Harran. At eiga frið við Gud og at vita, at eg eigi ein bústað í Himli, er størsta signing og ogn á fold.

# Hví varð Jesus føddur?

## John í Skemmuni

Nú um jólini er nógv stákan, og Jesusbarnið og krubban eru í miðdeplinum. Men hví varð Jesus føddur? Hvat var endamálið við komu Hansara til jarðar?

Svarið finna vit í boðskapinum, sum Jósef og hirðarnir fingu.

### Frelsari heimsins

Áðrenn Jesus varð føddur, vísti eingil Harrans seg fyri Jósefi í dreymi og segði (Matt. 1,21): „… *tú skalt kalla navn Hansara Jesus; tí* ***Hann skal frelsa fólk Sítt frá syndum teirra.***“

Og tá ið Jesus var føddur, stóð eingil Harrans fyri hirðunum uttan fyri Betlehem og dýrd Harrans lýsti rundan um teir. Eingilin segði við teir (Luk. 2,11): *„****Tykkum er í dag Frelsari føddur,*** *sum er Kristus, Harrin, í staði Dávids.“*

Endamálið við komu Jesusar var, at Hann skuldi verða Frelsari heimsins.

### Frelsuverkið fullgjørt

Vit vórðu útistongd frá Gudi orsakað av syndini. Men Gud elskaði okkum og vildi frelsa okkum frá syndum okkara. Tá ið Jóhannes doypari sá Jesus, segði hann (Jóh. 1,29): *„Hygg Lamb Guds, sum tekur burt synd heimsins!“*

Jesus varð tikin og negldur á krossin, og beint áðrenn Hann andaðist, segði Hann (Jóh. 19,30): *„Tað er fullgjørt!“ So boygdi Hann høvdið og gav upp andan.“* Á krossinum tók Jesus burtur syndina, ið forðaði okkum at koma til Gud.

Tá og ikki fyrr enn tá varð endamálið við komu Jesusar nátt.

### Er Jesus Frelsari tín?

Tú heldur jól og hugnar tær við krubbuna. Men hevur tú verið við krossin og sæð, hvat veruliga skuldi til, fyri at Jesus kundi verða Frelsari heimsins?

Trúgv á Jesus og takka Honum fyri, at Hann doyði fyri teg. Tá, og ikki fyrr enn tá, kanst tú siga, at Hann er tín Frelsari.

*„Hann kom til Sítt egna, men Hansara egnu tóku ikki ímóti Honum. Men so mongum sum tóku ímóti Honum, gav Hann mátt at verða børn Guds – teimum, ið trúgva á navn Hansara;“* (Jóh. 1,11-12).

# Emmaus bíbliubrævskúli Føroya



Jens Bech




Kundi tú hugsað tær at fingið meiri bíbliukunnleika, hóast tað ikki ber tær til at fara á bíbliuskúla? Emmaus bíbliubrævskúli Føroya hevur eitt fjølbroytt úrval av brævskeiðum, sum geva tær gott innlit í grundleggjandi læru Bíbliunnar. Skeiðini eru bæði til yngri og eldri.

## Fyrsta brævskeiðið á føroyskum

Brævskeiðini eru givin út av Emmaus Bíbliuskúlanum í USA. Fyrsta skeiðið, sum varð umsett til føroyskt fyrst í 1960-unum, ber heitið „Tænari Guds".

Skeiðið er ein einføld gjøgnumgongd av evangeliinum eftir Markus. Skeiðið er í 12 pørtum við einum spurnablaði til hvønn partin.

Næmingar, ið vilja luttaka, fáa skeiðið sendandi frá brævskúlanum. Eftir at næmingurin hevur gjøgnumgingið skeiðið og svarað spurningunum, sendir hann tað aftur. Eftir fullført skeið fær næmingurin prógv sendandi.

## Emmaus bíbliubrævskúlin

Emmaus bíbliuskúlin varð stovnaður í 1941 í Toronto, Kanada, av Ed Harlow, sum frammanundan hevði virkað sum trúboðari í Belgiska Kongo, John Smart og Ernest Tatham.

Fyrsta árið komu 144 næmingar á skúlan at granska orð Guds. Longu árið eftir gjørdist greitt, at mong vildu fegin luttaka í bíbliuundirvísingini, men at ikki bar øllum til at koma til Toronto, har skúlin var.

Harrin leiddi síðan Ed og onnur at fara undir bíbliubrævskeið, ið vóru gjørd út frá tilfarinum á bíbliuskúlanum. Byrjað varð við trimum skeiðum, og eftir fáum mánaðum vóru 137 luttakarar við í bíbliubrævskeiðum.

Luttøkan helt á at vaksa. Í 1948 vóru 17 ymisk brævskeið tøk, og fleiri enn 2.000 brævskeið vórðu send luttakarum. Vøksturin helt fram. Skeiðini gjørdust fleiri og á fleiri tungumálum, og talið av luttakarum vaks samsvarandi.

Nú meir enn 80 ár eru liðin, er talið á skeiðum farið upp um hundrað á fleiri enn 80 tungumálum, og meir enn 45 milliónir skeið eru send luttakarum.

Høvuðssætið hjá Emmaus Worldwide er í Dubuque, Iowa, USA.

## Brævskúlin kemur til Føroya

Føroyingurin Edmund Holm, ið sigldi við skipafelagnum Mærsk og hevði ábyrgdina av allari provianteringini hjá Mærsk skipunum, hevði skrivstovu í New York. Har kom hann í samband við ein av verkamonnunum hjá Emmaus bíbliuskúla.

Edmund greiddi Andrew Sloan frá skúlanum og brævskeiðunum, og Andrew setti seg í samband við skúlan og fekk loyvi at umseta og nýta skeiðini í Føroyum. Hetta var, sum nevnt, fyrst í 1960-unum. Fyrstu árini tók Andrew sær av at senda skeið út til luttakarar og at rætta tey.

Í 1966 tók Osvald Kjærbo Emmaus bíbliubrævskúlan á seg eftir Andrew Sloan, og síðan 2007 hevur Jens Bech á Skála havt ábyrgdina av brævskúlanum.

## Mong ymisk skeið

Síðan skúlin byrjaði í Føroyum, eru mong ymisk skeið umsett til føroyskt, og nógv børn, ung og vaksin hava fullført skeiðini gjøgnum árini. Emmaus bíbliubrævskeið vórðu eisini býtt út til leguluttakararnar í Zarepta í mong ár.

## Skeið, ið eru tøk á føroyskum:

Hugsað børnum:

- Bíblian mær sigur tað – nr. 1 og 2
- Frelsari lær meg – nr. 1, 2, 3 og 4
- Gyltir lyklar

Hugsað ungum og vaksnum:

- Hvat Bíblian lærir
- Lív og atferð hins trúgvandi
- Andaligi vøkstur hins trúgvandi
- Tænari Guds
- Virki Heilaga Andans
- Rómbrævið
- Filippibrævið
- Menn, ið hittu Meistaran
- Hann ber av øllum
- Hugsa um Skapara tín
- Ein Gud ein vegur

Hugsað kvinnum:

- Kvinnan, ið toknast Gudi

Hugsað pørum:

- Guds ætlan við hjúnabandinum

## Navnið

Hugskotið til navnið „Emmaus" er úr hendingini í Lukasi 24:13-32, har Jesus í fylgi við tveimum á veg til bygdina Emmaus (v. 27) *„útlegði fyri teimum tað, sum í øllum skriftunum var sagt um Hann."* Aftaná søgdu teir hvør við annan (v. 32) *„Brann ikki hjartað í okkum, táið Hann talaði við okkum á vegnum og læt okkum upp skriftirnar!"*

## Samband

Vilt tú vita meira, fáa bíbliubrævskeið sendandi, fáa vegleiðing ella hjálp til hetta, ert tú vælkomin at senda teldupost til ebs@ebs.fo

Eisini ber til at skriva boð til Emmaus bíbliuskeið á Facebook ella at senda mær eini boð ella ringja til mín á tlf. 28 78 40.

Fullførd skeið kunnu sendast til Emmaus bíbliubrævskeið v/Jens Bech, Hórheiðar 31, 480 Skála.

## Sum app

Ein app er tøk, har til ber at gjøgnumganga skeiðini á fartelefonini. Í appini ber til at velja mong ymisk tungumál. Í løtuni ber kortini ikki til at velja føroyskt, men eftir ætlan verður hetta møguligt í næstum.

Altjóða heimasíðan:
emmausworldwide.org

Appin: https://emmaus-app.com